## DAGSINS MEINING

# Ferðavinnutíð

Stóra ferðavinnutíðin er í hondum og fyrstu ferðamannaskipini hava longu vitjað í Havn og eitt hevur enntá vitjað í Mykinesi. Talið av ferðamannaskipum í ár verður hægri enn nakrantíð. Útvarpið veit at siga frá, at 34 skip fara at leggja farleiðina um Føroyar. Orsøkin til henda vøkstur er tað vaksandi ferðavinnusamstarvið í Útnorði. Hetta er ein sera áhugaverd og spennandi gongd. Vit her í Føroyum sum kunnugt áhugað í alternativum til fiskivinnuna. Ferðavinnan er eitt upplagt alternativ.

Spurningurin er so, hvussu ferðavinnan best kann skipast, hvat vit fíggjarliga fáa burtur úr og hvat tað er, ið ferðamaðurin kemur eftir í Føroyum. Tað er Ferðaráðið og ymiskir túroperatørar, ið skipa fyri ferðavinnuni. Her verður ivaleyst gjørt eitt sera gott arbeiði, tí ferðavinnan vindur støðugt uppá seg. Tað er sostatt eingin ivi um, at henda vinna kastar pening av sær til operatørarnar, hotellini og flutningsfyritøkurnar serstakliga Smyril Line og Atlantic Airways. Hetta kann bert vera gott.

So er tað spurningurin hvar ferðamaðurin kemur til, hvat vilja tey ferðandi síggja og uppliva. Svarið er ivaleyst náttúra og mentan. Í fjør var hetta evnið, ið nevnist kulturturisma viðgjørt á útnorðursráðstevnu í Havn og okkum vitandi var hetta envið aftur viðgjørt á ráðstevnu um vikuskiftið. Skal ferðavinnan byggja á tilfeingi sum náttúru og mentan krevur tað, at vit fara væl um. Hetta krevur at vit røkja okkara náttúru væl og at vit seta krøv til ferðafólkini og til túroperatørarnar. Men henda støða krevureisini, at vit røkja okkara mentan væl og at vit umhugsa, hvat tað er í okkara mentan, sum ferðafólkini vilja uppliva. Mentan okkara er rík og ekta. Ansast má tí væl eftir, at hon ikki gerst til eina handilsvøru, sum verður lagað til krøv og forvæntningar hjá ferðafólkunum. Hetta er ábygrdin hjá landsmyndugleikunum, landsstýri og løgtingi. Verður farið skynsamliga fram av øllum avvarandi fer ferðavinnan ivaleyst gerast eitt haldgott íkast til búskapin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sjálvræði - Yvirræði : 5 - 1

**Kristina Háfoss**
*Løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin*



Føroyar eru í dag umfataðar av donskum revsi- og rættargangslógum v.m., ið danska stjórnin einsíðis hevur sett í verk, hóast eitt einmælt Løgting í 2001 og aftur í 2003 hevur víst á, at vit í Føroyum ikki ynskja hesar lógir og at hetta tí gongur beint ímóti vilja Føroya fólks. Eisini

Hóast hetta hevur danska stjórnin í vár í ár einsíðis og uttan at upplýsa Løgtingið ella lata Løgtingið viðgera málið, lýst hernaðarligar revsi- og rættargangslógir og kunngerðir v.m. at verða galdandi fyri Føroyar. Hetta fekk Løgtingið til at gera vart við seg - enn einaferð.

Í mai 2003 tók enn einaferð eitt samt Løgting undir við einum ríkislógartilmæli, ið hevði til endamáls at avtaka donsku revsi- og rættargangslógarnar v.m., ið danska stjórnin hevði lýst fyri Føroyar. Ríkislógartilmælið varð lagt fram av øllum flokkum á tingi undantikið Sambandflokkinum. Hesin flokkur tók tó eisini undir við tilmælinum.

Men aftur hesuferð varð einmælta samtyktin hjá Føroya Løgtingi sett til viks av donsku stjórnini.

### Brot á siðvenju og afturstig fyri fólkaræðið

Higartil hevur verið siðvenja, at eingin ríkislóg fær gildi, uttan at Løgtingið samtykkir hesa lóg. Framferðin hjá donsku stjórnini í hesum málinum er tí fyrst og fremst eitt álvarsamt brot á ta siðvenju, ið hevur verið viðvíkjandi donskum lógum, ið verða settar í gildi fyri Føroyar. Somuleiðis kann hetta tulkast sum brot á heimastýrislógina § 7 og stýrisskipanarlógina § 48. Hetta er óivað eisini orsøkin til, at undanfarnar danskar stjórnir hava valt at fara ígjøgnum Løgtingið áðrenn danskar lógir verða settar í gildi fyri Føroyar. Men hetta tykist núverandi danska stjórnin ikki meta verða neyðugt, og er hetta eitt stórt afturstig fyri føroyska fólkaræðið. Eitt afturstig, ið vit ikki eiga at góðtaka.

### Væl grundgivið "óheppið mistak" ?

Hóast tvær einmæltar áheitanir frá Føroya Løgtingi - í 2001 og 2003 - og nú eisini uppskoti frá fólkatingsumboði Tjóðveldisfloksins og Føroya fólks á Fólkatingi um at avtaka hernaðarligu revsi- og rættargangslógirnar v.m. fyri Føroyar - hevur danska stjórnin nú enn einaferð staðfest, at hon metir tað verða rætt at hon hevur lýst donsku hernðarligu revsi- og rættargangslógirnar v.m. at verða galdandi fyri Føroyar, og at hon ikki fer at broyta hetta.

Talan er tí ikki um nakað "óheppið mistak", sum Lisbeth L. Petersen vil verða við í grein síni. Talan er somuleiðis um eina andsøgn tá Lisbeth L. Petersen seinni í greinini vil verða við, at danska stjórnin kom við bæði "klárari og greiðari grundgeving" fyri tí hon hevði gjørt og fyri at hon heldur fast í avgerð síni. Harvið kann talan ikki verða um nakað "óheppið mistak", men heldur um misnýtslu av tí yvirvaldsrætti, ið føroyingar lata dønum uppí hendur í dag.

Hesar lógir eru heldur ikki bert galdandi fyri "danskar herðmenn í Føroyum" - sum Lisbeth L. Petersen tekur til - men geva somuleiðis donskum myndugleikum rættindi í krígstíð at taka ognir og fólk í Føroyum um teir meta hetta verða neyðugt. Tí kunnu hesar lógir og kunngerðir í stóran mun fáa ávirkan á føroyingar - ikki minst um vit ikki draga somu línu sum danir í krígstíð. Hetta varð eitt nú galdandi í seinasta krígnum ímóti Irak.

### Stjórnin virðir ikki føroyingar

At enda verður í greinini hjá Lisbeth L. Petersen gjørt vart við, at ríkisfelagsskapurin hevur góða undirtøku á Fólkatingi. Ja, tað kann ikki undra. Men hinvegin kann tað stórliga undra, at Lisbeth L. Petersen endar grein sína við hesum orðum: "Tí er nú at vóna, at okkara landsstýri eisini ger sítt til, at samskiftið millum londini bæði heldur fram við tí virðing og áliti, sum felagsskapurin eigur at fáa fyri at røkka bestu loysnunum."

Átti henda áheitan ikki at verða vend ímóti donsku stjórnini ?

Virðing, álit og felagsskapur - ja, tað er ikki júst hetta, ið hevur eyðkent framferðarháttin hjá donsku stjórnini mótvegis føroyingum, landsstýrinum og Føroya Løgtingi.

### 5 flokkar fyri føroyskum fullveldi

Tí má staðfestast, at:

- Tíverri er enn í dag ein flokkur í Føroyum, ið heldur fast í at arbeiðast ikki skal fram ímóti einum sjálvstøðugum Føroyum, men at Føroyar hinvegin skulu verða verandi undir tí yvirræði, ið danska stjórnin enn einaferð hevur misnýtt mótvegis føroyingum.

- Tíbetur eru í dag fimm flokkar, ið vilja arbeiða fyri sjálvræði í einum sjálvstøðugum Føroyum og tíbetur vísir søgan runt allan heim, at tíðin altíð arbeiðir til frama fyri einum sjálvstýrisstríði og fyri tjóðarfrælsi. Og nú nærkast.

Tolin trívst…

# Føroya Banki lækkar rentuna

Tann 6. juni 2003 lækkaði Danski Tjóðbankin diskontoina við 0,5 pst. niður í 2 pst. p.a. Sum avleiðing av hesum javnar Føroya Banki rentustig síni við gildi frá 14. juni 2003.

Rentustigini á útlánum og kredittum verða lækkað við 0,25 - 0,375 pst.

Rentan á sethúsalánum við 1. veðrætti verður eftir hetta 4,25 pst. uttan mun til lánisnið.

Rentan á innlánum uttan uppsøgn verður óbroytt. Viðvíkjandi innlánum við serligum treytum verður rentan lækkað við 0,5 pst., meðan rentan á innlánum við 3 mánaða uppsøgn einans verður lækkað við 0,25 pst. Innlánsrentan hjá Føroya Banka fer tí at liggja á odda, og hetta er fyri innlán við stuttari uppsagnartíð - einans 3 mánaðar.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## UTTAN ÚR HEIMI

# Amerikanararnir eru verri enn Saddam Hussein



*Amerikansku hermenninir í Irak verða lagdir undir at fara óneyðuga harðliga fram*

**Amerikansku hermenninir í Irak verða lagdir undir at nýta óneyðuga harða framferð ímóti irakskum sivilfólki**

**IRAK**
*Árni Joensen:*

Sunnukvøldið fór amerikanski herurin í Irak undir eitt átak ímóti teimum, sum seta seg upp ímóti hersetingarvaldinum. Hermenninir framdu fleiri húsarannsóknir, og nógv fólk vórðu tikin.

Málið við átakinum er at fáa bilbukt við bólkar, sum framvegis gera mótstøðu ímóiti amerikansku hermonnunum tveir mánaðir eftir, at Bagdad fall. Mótstøðan hevur verið serliga hørð í økinum norðan og vestan fyri høvuðsstaðin, og fleiri amerikanskir hermenn eru deyðir og særdir í álopum.

Eygleiðarar siga, at amerikanarar hava ongantíð verið so illa umtóktir í Irak sum nú, og fleiri fjølmiðlar skriva, at amerikansku hermenninir nýta óneyðuga harða framferð ímóti irakska fólkinum.

Eygnavitni hava greitt frá, at amerikansku hermenninir leggja kvinnur og børn í hondjørn, og at fleiri fólk eru deyð, tí amerikanararnir hava sýtt teimum læknahjálp, skrivar tíðindastovan AP. Hetta avsannar herleiðslan.

Í býnum Falluja norðan fyri Bagdad rannsakaðu amerikansku hermenninir fleiri hús og tóku fleiri fólk gjáranáttina.

- Sjálvt ikki Saddam Hussein gjørdi slíkt ímóti okkum. Vit eru sloppin undan einum trupulleika, men hava fingið ein annan, sum er uppaftur verri, segði tann 60 ára gamli Jassim Ali Mohammed við AP í gjár.

# Tað verður uppaftur heitari enn higartil hildið

**Hitin á Jørðini fer at veksa uppaftur meiri í hesari øldini, enn vísindafólk higartil hava hildið**

**VEÐURLAG**
*Árni Joensen:*

Higartil hava veðurlagsgranskarar hildið, at meðalhitin á Jørðini fer at veksa í mesta lagi 5,8 stig í 21. øld, men nú vísa nýggjar kanningar, at hendan metingin røkkur ikki. Nú verður hildið, at meðalhitin kann veksa millum sjey og tíggju stig tey næstu hundrað árini.



Paul Crutzen, professari, sigur við tíðarritið New Scientist, at smáir bitlar av svávuli og øðrum evnum hava »steðgað« strálunum frá sólini upp í atmosferuni. Høvdu hesir bitlarnir ikki verið har, hevði hitin á Jørðini helst vaksið fýra ferðir skjótari, enn hann ger. Við øðrum orðum hava vit verið heppin, at hitin á Jørðini bara er vaksin 0,6 stig seinastu hundrað árini.

Men hesir somu bitlarnir eru vandamiklir fyri fólk í nógvum stórum býum, tí tað kann vera lívshættisligt at anda teir í seg. Í Kina eru myndugleikarnir farnir í hernað ímóti slíkum bitlum, skrivar New Scientist.

# Halda fast um lønarkrav

Um vikuskiftið eydnaðist tað at fáa ein nýggjan sáttmála millum grønlendska heimastýrið og fakfelagið SIK. Sáttmálin gevur átta prosent lønarhækking næstu trý árini, hóast SIK hevði kravt at fáa tíggju prosent afturat.

Um fjúrtan dagar skal SIK samráðast við grønlendska arbeiðsgevarafelagið um nýggjan sáttmála, og her fer felagið at halda fast um tey tíggju prosentini, sigur formaðurin, Jens G. Berthelsen. Við grønlendska útvarpið sigur hann, at tað fer ikki at bera til, at teir privatu arbeiðsgevararnir rinda minni løn enn tað almenna. Jens G. Berthelsen leggur afturat, at framgongd hevur verið í grønlendska búskapinum tey bæði seinastu árini, og at løntakararnir eiga at fáa sín part av ágóðanum.

Grønlendska arbeiðsgevarafelagið hevur boðið SIK-limunum 6,5 prosent afturat í løn.

# Eiga ikki at roykja har børn eru

Tað er ikki óhugsandi, at lógin um nøkur ár fer at banna fólki at roykja inni, um børn eru í húsinum.

Í hvussu er heldur formaðurin í altjóða heilsustovninum WHO, Gro Harlem Brundtland, at ein tílík lóg er als ikki óhugsandi. Í samrøðu við norsku tíðindastovuna sunnudagin vísti hon á, at tá politikararnir fyri 20 árum síðani bannaðu foreldrunum at sláa børnini, vóru tað mong, sum mótmæltu, at lógin skuldi gera av, hvat fólk kundu gera í sínum egnu húsum.

- Men meirilutin hevði eina aðra áskoðan, og soleiðis verður tað eisini við hugburðinum, tá tað snýr seg um at roykja heima hjá børnunum. Um eini tíggju ár fara fólk at hava eina aðra uppfatan enn í dag, segði Gro Harlem Brundtland.

# Hægri bensinprísur kann elva til ófrið

Myndugleikarnir í Nigeria kunngjørdu sunnudagin, at teir umhugsa at hækka prísin á bensini og øðrum oljuúrdráttum.

Sum er letur nigeriski ríkiskassin einar 12 milliardir krónur í stuðuli fyri at halda bensinprísinum niðri, men hetta ber ikki til longur, sigur stjórnin og vísir á, at tað almenna oljufelagið hevur brúk fyri størri inntøkum. Eygleiðarar í Nigeria siga, at ætlanin hjá stjórnini kann fara at elva til umfatandi ófrið. Tá myndugleikarnir í januar í fjør hækkaðu prísin á bensini, fóru fleiri fakfeløg í verkfall, og nógvastaðni var blóðigur ófriður. Hesaferð roynir stjórnin at sleppa undan ófriði á arbeiðsmarknaðinum og hevur tí tingast við fakfeløgini um ta ætlaðu príshækkingina.

Nigeria er eitt av teimum stóru oljuframleiðaralondunum, og næstan 90 prosent av landsins inntøkum stava frá oljuni.

# Eiga at velja Clinton

NATO skal hava nýggjan aðalskrivara, tá skotin John Robertson fer frá. Fleiri hava verið nevnd sum møgulig evni at taka við, og nú hevur formaðurin í norska Framburðsflokkinum, Carl I. Hagen, skotið upp at velja fyrrverandi amerikanska forsetan Bill Clinton til NATO-aðalskrivara.

Carl I. Hagen heldur, at NATO hevur tørv á einum persóni við altjóða myndugleika, virðing og royndum. Hann vísir á tey versnaðu viðurskiftini millum Frakland og Týskland øðrumegin og USA, Bretland og Spania hinumegin, og at Clinton er tann best egnaði til at fáa viðurskiftini aftur í rættlag.

Norska stjórnin hevur virkað fyri sínum egna verjumálaráðharra, Kristin Krohn Devold, sum møguligum evni til aðalskrivarastarvið í NATO. Carl I. Hagen sigur, at hon er uttan iva egnað til starvið, um aðalskrivarin skal leiða eina skrivstovu í Bruxelles, men sjálvur heldur hann aðalskrivarastarvið hava størri týdning enn so.